# Tilmæli frá Fiskidaganevndini
# til
# landsstýrismannin í fiskivinnumálum
# fyri
# fiskiárið 2008/2009

# 1. Inngangur

Fiskidaganevndin er sett við heimild í § 5 stk. 9 í løgtingslóg nr. 28 um vinnuligan fiskiskap frá 10. mars 1994, við seinni broytingum.

**Uppgávan** hjá Fiskidaganevndini er at lata landsstýrismanninum metingar um støðuna í botnfiskastovnunum og tilmæli um fiskidagar, og hvussu fiskiskapurin skal skipast tað komandi fiskiárið.

Limir í nevndini eru: Óli Samró, formaður, Dánjal Jacobsen, Partrolarar; Theodor Poulsen, Trolbátar; Auðunn Konráðsson, Meginfelag Útróðrarmanna; Dánjal Jákup Vilhelm, Felagið Línuskip; Eyðun Johannesen, FF. Skrivari er Hertha Olsen.

Fiskidaganevndin hevur havt seks fundir. Dánjal Jacobsen, Auðunn Konradsson og Dánjal Jákup Vilhelm hava verið á øllum fundunum. Fyri FF hevur Jan Højgaard verið á tveimum fundum, Karl Isaksen á einum og Eyðun Johannesen hevur verið á tveimum fundum. Fyri trolbátar hevur Theodor Poulsen verið fimm ferðir og Jens Jacob Olsen eina ferð.

# 2. Støðulýsing

## Fiskidagar: øll ár

Talvan niðanfyri vísir fiskidagatalið, síðani fiskidagaskipanin byrjaði til støðuna í dag fyri allar bólkar, sum eru í skipanini.

Bólkur 2 hevði í 1996 7.199 dagar, og hevur í dag 5.143 dagar ella 29 % færri.

Fyri bólk 3 er nakað annarleiðis, tí skip í bólki 4 eru komin inn í bólkin og hava tikið dagar við sær. Her er dagatalið tískil økt 29%.

Fyri bólk 4 er dagatalið minkað frá 9.328 til 3.404. Her er ein minking í døgum upp á heili 64%.

Fyri bólk 5 hevur dagatalið skift upp og niður, men samanborið við 1996, so er dagatalið lækkað 17%.

**Talva 1:** Fiskidagatal fyri bólk 2,3,4 og 5. Frá 1996 til 2008

| **Bólkur** | **5** | **4** | **3** | **2** | dagar íalt |
|---|---|---|---|---|---|
| **1996/97** | 24.202 | 9.328 | 2.660 | 7.199 | 43.389 |
| **1997/98** | 27.000 | 9.394 | 2.660 | 6.752 | 45.806 |
| **1998/99** | 22.444 | 8.904 | 2.527 | 6.432 | 40.307 |
| **1999/2000** | 22.444 | 8.932 | 2.527 | 6.816 | 40.719 |
| **2000/2001** | 22.444 | 8.591 | 2.566 | 6.597 | 40.198 |
| **2001/2002** | 22.444 | 8.619 | 2.605 | 6.597 | 40.265 |
| **2002/2003** | 22.220 | 8.116 | 2.759 | 6.246 | 39.341 |
| **2003/2004** | 21.776 | 7.805 | 2.746 | 6.121 | 38.448 |
| **2004/2005** | 21.235 | 7.702 | 2.672 | 6.144 | 37.753 |
| **2005/2006** | 21.235 | 3.703 | 3.619 | 5.377 | 33.934 |
| **2006/2007** | 20.598 | 3.630 | 3.538 | 4.632 | 32.398 |
| **2007/2008** | 20.186 | 3.404 | 3.439 | 5.143 | 32.172 |
| **% broyting 96-08** | -17% | -64% | 29% | -29% | -26% |

Samlað er dagatalið minkað 26%.

### 2.1. Støðan hjá fiskastovnunum

Fyri hvønn veiðubólk sær hevur nevndin viðgjørt veiðuna eftir toski, hýsu, upsa, longu, brosmu, havtasku og eftir flatfiski. Nevndin hevur fyri hvønn skipabólk sær og á teimum ymisku leiðunum viðgjørt, hvussu fiskiskapurin sær út, nøgd, stødd, og hvussu fiskurin er fyri. Somuleiðis hevur nevndin eins og árini frammanundan mett um, hvussu støðan er við ætinum.

Úttalilsir byggja á eygleiðingar frá teimum, ið hava sítt dagliga yrki á sjónum.Vit hava ikki vísindaligar royndir ella annað taltilfar at vísa á enn tað, sum er alment.

Støðan hjá toskastovninum hevur ikki verið góð í trý ár. Tó er rímiliga nógv til av stórum toski. Veiðunøgdin av toski fyri hvønn bólk sær - ið er í fiskidagaskipanini – er eitt sindur minni enn í fjør.

Sum heild metir útróðrarflotin, at hýsan er á einum lágum støði, meðan størru skipini meta, at nakað sama mongd er til sum tvey til trý tey seinastu árini.

Vinnan metir, at upsin er væl fyri.

Mett verður, at longa, brosma, havtaska, tunga og reyðsprøka eru væl fyri. Vit hava ikki kunnleika um svartkalva og kalva.

## 2.2. Veiðan eftir toski býtt á bólkar

Talvurnar niðanfyri eru ein útgreining av veiðuni eftir toski seinastu árini býtt eftir stødd og hvørjir skipabólkar veiða toskin.

**Talva 2:** Toskaveiða í tonsum býtt upp á støddir, árini 2002 til 2008. Fyri hvørt árið eru tølini frá 1. juni til 31 mai.

| Stødd/bólk | 2002-03 | 2003-04 | 2004-05 | 2005-06 | 2006-07 | 2007-08 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur 0 | 2.665 | 3.600 | 942 | 217 | 159 | 43 |
| Toskur 1 | 1.838 | 3.449 | 1.045 | 816 | 806 | 796 |
| Toskur 2 | 3.637 | 5.998 | 3.891 | 3.321 | 2.471 | 2.704 |
| Toskur 3 | 13.803 | 10.004 | 6.601 | 5.891 | 3.934 | 3.754 |
| Toskur 4 | 10.969 | 10.254 | 4.639 | 4.181 | 3.034 | 3.372 |
| Toskur 5 | 1.685 | 1.348 | 571 | 1.001 | 1.328 | 686 |
| Íalt | 34.597 | 34.653 | 17.689 | 15.427 | 11.732 | 11.355 |

Talva 2 vísir, at veiðan eftir toski seinastu 12 mánaðirnar hevur verið 11.355 tons. Hetta er tað minsta veitt er av toski seinastu tíggju árini. Talva 1 vísir, at nøgdin av toski 5 hevur verið úr 571 tonsum og upp í 1.685 tons ella í meðal 1.103 tons.

Viðmerkjast skal, at í talvu 2 eru veiðutølini hjá djúpvatnstrolarunum. Hesir eru ikki við í fiskidagaskipanini. Fiskidaganevndin staðfestir, at ein broyting er farin fram í veiðumynstrunum hjá bólki 1. Tað viðførir, at samansetingin av toskaveiðuni er broytt.

**Talva 3.** Samanbering nøgd og prosentbýtið 2007/08 við samlaðu veiðuna 2002/08

| Stødd/bólk | 2007-08 tons | % | 02-03/07-08 tons | % |
|---|---|---|---|---|
| Toskur 0 | 43 | 0% | 7.626 | 6% |
| Toskur 1 | 796 | 7% | 8.750 | 7% |
| Toskur 2 | 2.704 | 24% | 22.022 | 18% |
| Toskur 3 | 3.754 | 33% | 43.987 | 35% |
| Toskur 4 | 3.372 | 30% | 36.449 | 29% |
| Toskur 5 | 686 | 6% | 6.619 | 5% |
| Íalt | 11.355 | 100% | 125.453 | 100% |

Talva 3 og 4 vísa at veiðan býtt eftir stødd er støðug. Nógv mest verður veitt av toski 2, 3 og 4. Nøgdin av toski 2 er lutfalsliga meiri í ár enn undanfarin ár. Hetta er eisini ein eygleiðing, fiskimenn hava gjørt í ár, har minni er til av smærri toski, og lutfalsliga meiri av stórum toski.

**Talva 4.** Støddarbýtið veiða mei 2007 apríl 2008 (1.000 tons).

| | Toskur 0 | Toskur 1 | Toskur 2 | Toskur 3 | Toskur 4 | Toskur 5 | Tils | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bólkur 1 | 7 | 119 | 706 | 762 | 452 | 37 | 2.083 | 18% |
| Bólkur 2 | 31 | 101 | 244 | 298 | 119 | 7 | 800 | 7% |
| Bólkur 3 | 0 | 415 | 1.404 | 1.291 | 719 | 70 | 3.899 | 34% |
| Bólkur 4 A+B | 2 | 46 | 78 | 384 | 641 | 140 | 1.291 | 11% |
| Bólkur 4 T | 2 | 46 | 69 | 220 | 320 | 72 | 729 | 6% |
| Bólkur 5 A+B | 0 | 69 | 204 | 799 | 1.121 | 359 | 2.552 | 22% |
| Tilsamans | 43 | 796 | 2.704 | 3.754 | 3.371 | 686 | 11.354 | 100% |

Samlað %-býti av toskaveiðuni millum skipabólkar seinast fiskidagaár er:

| | |
|---|---|
| Línuskipini: | 34 %, |
| Smábátarnir í bólki 5 | 22 %, |
| Lemmatrolararnir | 18 %. |
| Bólkur 4A og B . | 12% |
| Partrolararnir | 7 % |
| trolbátarnir 4 T | 6 % |

**Talva 5.** Støddarbýtið í prosent, veiða mei 2007 apríl 2008.

| | Toskur 0 | Toskur 1 | Toskur 2 | Toskur 3 | Toskur 4 | Toskur 5 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bólkur 1 | 15% | 15% | 26% | 20% | 13% | 5% |
| Bólkur 2 | 73% | 13% | 9% | 8% | 4% | 1% |
| Bólkur 3 | 1% | 52% | 52% | 34% | 21% | 10% |
| Bólkur 4 A+B | 5% | 6% | 3% | 10% | 19% | 20% |
| Bólkur 4 T | 6% | 6% | 3% | 6% | 9% | 10% |
| Bólkur 5 A+B | 1% | 9% | 8% | 21% | 33% | 52% |
| Tilsamans | 100% | 100% | 100% | 100% | 100% | 100% |

Talvan vísir, at tað serliga er bólkur 5, sum fiskar smáa toskin, meira enn helvtina av toski 5 og ein triðing av veiðuni av toski 4. Leggjast skal í geyma, at hetta er veiðan, sum er skrásett í hesum bólki! Frítíðarfiskiskapurin í bólkinum er ikki skrásettur.

Hetta býtið hevur verið tað sama í nógv ár.

**Talva 6:** Samlað veiða í føroyskum sjóøki fiskidagaárini 2000-08 (1. mei-30.apríl)

| | 2000/01 | 2001/02 | 2002/03 | 2003/04 | 2004/05 | 2005/06 | 2006/07 | 2007/08 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Toskur** | 24.393 | 30.390 | 35.861 | 34.715 | 19.494 | 15.662 | 12.036 | 11.774 |
| **Hýsa** | 13.367 | 16.199 | 24.765 | 23.901 | 19.558 | 18.241 | 13.653 | 9.132 |
| **Upsi** | 33.250 | 49.843 | 49.990 | 37.054 | 52.242 | 65.397 | 56.953 | 53.113 |
| **Kongafisk** | 5.474 | 4.576 | 3.875 | 3.066 | 4.079 | 2.781 | 2.872 | 1.810 |
| **Svartkalvi** | 3.936 | 3.188 | 2.280 | 2.211 | 1.574 | 920 | 941 | 1.686 |
| **Havtaska** | 2.082 | 1.831 | 1.739 | 2.832 | 3.194 | 4.917 | 4.143 | 2.717 |
| **Gulllaks** | 3.982 | 10.082 | 7.427 | 5.575 | 3.518 | 6.157 | 12.696 | 14.597 |
| **Annað** | 5.446 | 5.681 | 6.109 | 7.220 | 7.469 | 7.587 | 8.264 | 7.342 |
| **Samlað veiða** | 91.929 | 121.789 | 132.046 | 116.575 | 111.129 | 121.662 | 111.558 | 102.171 |

**Annað:** longa, brosma, blálonga, tunga, reyðsprøka

Talva 6 vísir, at samlaða veiðan var størst í 2002/03. Tá var veiðan 132 túsund tons, men veiðan var eisini góð í 2005/06. Her er tað serliga upsi, sum so nógv er til av. Síðani er samlaða veiðan minkað nakað, og fyri 2007/08 er veiðan minkað heilt niður í 102 túsund tons.

Fiskasløgini, sum hava havt stóra afturgongd í veiðu, eru toskur, hýsa, kongafiskur og svartkalvi.  Upsaveiðan er økt, og serliga 2005/2006 var eitt gott upsaár.Mongdin av gulllaksi er ymisk. Fyri seinasta árið sær út til, at nógvur gulllaksur verður fiskaður.

## 2.3. Æti

Fiskurin sum heild er væl fyri til fiti. Vit meta, at higartil í ár hevur verið nógv æti á øllum leiðum – eisini á Føroya Banka.

Okkara meting er, at nóg mikið er til av føði!

# 3. Tilmælir

'

Fiskidaganevndin er í nógv ár komin við tilmælum, ið ikki eru fylgd. Í ár vilja vit endurtaka nøkur av tilmælunum, vit er komnir við seinastu árini.

### 3.1. Svartkjaftaveiðan

Fyri at beina allan iva burtur mæla vit til, at myndugleikarnir gjøllari fylgja hjáveiðuni eftir botnfiski hjá útlendsku og føroysku svartkjaftaskipunum.

Mælt verður til at seta eina skipan í verk við eftirlitsfólki umborð á teimum pelagisku førunum, sum fiska í føroyskum sjógvi. Eftirlitsfólkini eiga at hava heimild at steðga veiðu eftir pelagiskum fiski, tá hjáveiðan er oman fyri eitt ávíst mark.

Nevndin hevur framvegis eina fatan av, at svartkjaftaflotin fiskar nógvan botnfisk sum hjáveiðu. Nevndin heldur, at nógva svartkjaftaveiðan undir Føroyum hevur eina beinleiðis ávirkan á støðuna hjá fiskastovninum.

### 3.2. Steðgur av allari veiðu á firðum og sundum

Vit mæla til, at øll veiða á firðum og sundum verður steðgað í eitt ár. Vit mæla til, at eingin veiða verður loyvd innan fyri ein fjórðing úr landi. T.e. at øll veiða innan fyri 1 fjórðing, vinnulig og í frítíð, hvílir í eitt ár.

Grundað á tilmæltu flytingina verður mælt til, at øll veiðuøki verða endurskoðað.

### 3.4. Hjákvotan av toski hjá lemmatrolarum

Hjáveiðukvotan í nøgd eigur at takast av. Ikki skal vera loyvt at royna á ytru og innaru leið á sama túri. Hjáveiðukvotan hjá bólki 1, at fiska tosk og hýsu á innaru leið, eigur at vera broytt til 3 %.

### 3.5. Føroya Banki

Toskurin á Føroya Banka er eftir okkara tykki so illa fyri, at okkurt, ið veruliga munar, verður gjørt í eitt tíðarskeið í eitt ár.

Okkara tilmæli er at steingja Føroya Banka fyri allari veiðu í eitt ár við undantak av landsyningskantinum, øki a.

### 3.6. Lemmatrolarar og garnaskip:

Síðan fyrstu frágreiðing hevur fiskidaganevndin mælt til, at øll veiða eftir botnfiski á føroyskum øki skal vera innanfyri fiskidagaskipanina.

Lemmatrolararnir eiga at koma inn í skipanina eftir sama leisti sum hinir bólkarnir upprunaligu komu inn í skipanina og við teimum niðurskerjingum, sum hava verið í skipanini, síðan hon kom í gildi.

Sama er galdandi fyri garnaskipini.

### 3.7. Útlendsk veiða

Útlendsk skip, ið fiska í føroyskum sjóøki, eiga at byrja og at enda veiðuna í føroyskum sjógvi. Ikki skal bera til at koma inn á føroyskt øki á sama túri sum útlendsku skipini fiska í øðrum umráðum. Eftirlit er nærum ómøguligt, tá fiskast kann innan fleiri landamørk á sama túri.

# 4. Tilmæli um dagatal

## 4.1. Fiskiorka

Fiskidaganevndin hevur í fleiri ár mælt til eina dagføring av teimum útrokningum av veiðuorkuni býtt eftir bólkunum, ið liggur til grund fyri fiskidagaskipanina.

Í ár er Fiskiorkunevndin komin við ávegis frágreiðing, handað 6. juni. Í ávegis álitinum er einki gjørt við útrokningarnar, sum liggja til grund fyri fiskidagaskipanina. Í niðurstøðuni verður sagt:

"Nevndin kann ikki gera nakra endaliga niðurstøðu, um skipanin hevur tryggjað, at veiðan er hildin innan fyri lívfrøðiligu karmarnar, so at í miðal bert ein triðingur av stovnunum verður veiddur á hvørjum ári. Hetta kann ikki vera gjørt, fyrr enn Fiskirannsóknarstovan hevur gjørt útrokningar av fiskidagatalinum fyri fiskiárið 2008-2009. Nevndin kemur aftur til hetta, tá útrokningarnar eru tøkar."

Eingin tíð er sett á, nær tað verður gjørt, og er tað ikki hugsandi, at tilfarið er tøkt til fiskidagaárið 2008/09 verður ásett. Nær tilfarið er tøkt – ella um tað verður gjørt – er óvist.

Fiskidaganevndin metir, at upprunaliga javnvágin í veiðuorkuni er farin av lagi.

Tí má finnast fram til eina nýggja javnvág.

Fiskidaganevndin mælir til, at eitt"ættartræ" verður gjørt fyri hvønn bólk sær. Gingið verður ígjøgnum tey loyvir og skip, ið eru skrásett í hvørjum bólki. Á tann hátt slepst undan gitingum um, hvussu bólkarnir eru broyttir á hvørjum ári.

## 4.2. Dagatal fiskiárið 2008/2009

Tá fiskiorkuálitið ikki er tøkt, hava vit einki amboð at taka støðu útfrá viðvíkjandi veiðuorku.

Í ár er ikki semja um tilmælið um dagatalið fiskiárið 2008/09.

Í ár býtir Fiskidaganevndin seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin, Theodor Poulsen, Trolbátar; Auðunn Konráðsson, Meginfelag Útróðrarmanna; Dánjal Jákup Vilhelm, Felagið Línuskip; metir, at dagatalið ikki eigur at broytast.

Meirilutin mælir til, at sama dagatal sum fyri 2007/2008 verður ásett fyri allar bólkar komandi fiskidagaárið.

Hetta er grundað á, at meirilutin metir fiskidagaskipanina at vera eina langtíðar javnvágarskipan, har fiskidagatalið ikki skal stillast – hvørki upp, tá nógvur fiskur er, ella niður, tá minni er til. Tað einasta, sum kann broyta dagatalið, er broyting í veiðuorkuni.

Meirilutin metir ikki, at ógvuslig lop hava verið í veiðiorkuni hetta síðsta árið.

### 4.3.Minnilutar:

**Dánjal Jacobsen, :**
Dánjal Jacobsen hevur gjørt eina meting av broytingini av fiskiorkuni í bólki 2, partrolarar. Metingin er, at fiskidagatalið eigur at verða lækkað við 10 %. Hetta er gjørt við atliti til, at dagatalið síðan 1996 er lækkað. Óli Samró og Eyðun Johannesen, FF, taka undir við Dánjali Jacobsen

**Óli Samró:**
Við grundarlagi í metingum hjá Fiskidaganevndini av støðuni hjá toski seinastu árini, sum eisini samsvara við greiningarnar hjá Fiskirannsróknarstovuni um tilgongd av toski, verður ásannað, at støðan er hættislig hjá toskastovninum. Tí má í ár gerast serlig inntriv, ið veruliga muna, og sum minka um veiðuna eftir toski, serliga tí smáttfallandi toskinum.

Um skipanin øll sum hon er ikki verður gjøgnumgingin og stillað eftir tí veruleika, sum er í 2008, innan nýggja fiskidagaárið byrjar í september, so mælir formaðurin til eitt serligt inntriv í dagatalið hjá teimum bólkunum, sum fiska mesta toskin, bólki 3, 4AB og 5. Tilmælið er at lækka dagatalið fyri bólk 3, 4AB og 5 við 20-25 %.

Bólkur 3:
Bólkur 3 fiskar mest av toski av øllum skipabólkum, tilsamans árliga umleið ein triðing (tíðarskeiðið 2002-08 35 %) av samlaðu árligu toskaveiðuni.

Bólkur 4AB:
Bólkur 4 er minkaður burtur í einki seinastu árini. Fá før eru í drift. Tó fiskar hesin bólkur mest tosk.

Bólkur 5:
Bólkur 5 fiskar serliga tosk inni við land. Bólkur 5 fiskar serliga smáan tosk, stødd 4 og 5. Ring fiskiár, fiskar hesin bólkur ikki nógv, meðan bólkurin er effektivur góð ár. Hetta fiskiárið hevur bólkur 5 fiskað lítið. Umframt aðrar avmarkingar eigur dagatalið fyri hendan bólk at skerjast munandi. Men í bólkinum eru nógv loyvir og ein stór latent veiðuorka, sum verður aktiv, tá fiskur er.

Eyðun Johannesen, FF, tekur undir við Óla Samró

Vegna Fiskidaganevndina
20.06.08



_________________
Óli Samró, formaður